# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Finnboga til minnis



Tað vóru tung boð at fáa í morgun her í London, her vit eru ávegis til Suðurafrika í brúðleyp hjá soni okkara, Dánjal, at okkara góði og trúgvi vinur gjøgnum mong, mong ár, Finnbogi, var deyður. Tað var stutt eftir ólavsøku, at hann og Ása komu inn á gólvið hjá okkum, og fortaldi okkum, at hann hevði fingið eina ólekiliga sjúku, so vit vistu, at hann livdi illa, men at lívsskeið hansara longu var runnið, tað varaði okkum ikki. Tá ið eg seinasta mikukvøld, kvøldið fyri vit fóru avstað, var og vitjaði Finnboga, hevði hann tað gott og vit høvdu eina sera góða løtu sam-an. Lítið vardi meg, at hetta var seinasta ferðin vit hittust, men vit vita ikki nær dagar okkara eru taldir, tað er bert Hann ið øllum valdar, ið veit tað.

Tað var á Norðoyastevnu í 1961 at vit báðir hittust fyrstu ferð inni hjá Nielsi á Biskupstøð og her knýttu eitt vinarband fyri lívið, eitt vinarband sum styrknaði, tá ið vit bæði Kristiana byrjaðu at ganga saman og seinni giftust. Finnbogi gekk tá á studentaskúlanum, og tá ið hann gekk í 3.g. byrjaði hann at atbeiða í útvarpinum. Eitt arbeiði, sum hann gekk uppí við lív og sál, og tá ið studentsprógvið varð tikið, valdi hann sær fjøllmiðlaarbeiði sum lívsstarv.

Tað var ein spennandi tíð at arbeiða í útvarpinum fyrst í seksti árunum. Manningin var ikki stór og senditíðin ikki long, men sendingarnar vóru fjølbroyttar og hugfloginum bilti ikki. Soleiðis vóru Finnbogi og eg mangan á ferð. Í Trøllhøvda eftir líra saman við Sjúrða í Kirkjubø, ræning í Skúgvi, og ikki at gloyma, tá ið Hvalbingar vóru veðurfastir í Líttla Dímum, og vit báðir fóru suður við Jens Chr. Svabo. Tað er ein løgin kensla at hugsa sær, at teir flestu av teimum, sum tá vóru í útvarpinum ikki eru millum okkara longur.

Finnbogi og eg vóru eisini saman annan páskadag í 1966, tá ið ungir klaksvíksingar hittu hann í Havn og bóðu hann um at stilla upp fyri Tjóðveldisflokkin í Norðoya valdømi til løgtingsvalið í november.

Finnbogi tók av og var hetta ein avgerð, sum hevði stóran týdning í lívi hansara. Hann varð valdur á ting, bert 23 ára gamal. Tað var annars spennandi at bíða eftir endaliga valúrslitinum í 1966. Eitt valstað, Norðdepli, hevði ikki talt persónligu atkvøðurnar upp valkvøldið, so bíðast mátti eina viku eftir endaliga úrslitinum. Tá ið tað so stutt fyri tíðindasendingina um kvøldið gjørdist greitt, at Finnbogi varð valdur, sendi Niels Juul meg út til hansara at siga honum frá, tí Niels Juul helt ikki at hann skuldi frætta tað gjøgnum Útvarpið. Sum politikari setti Finnbogi sær altíð stór mál og flestu av teimum náddi hann. Hann endaði sítt politiska starv í landsins hægsta sæti, sum løgtingsformaður.

Tað verður hugtungt hjá okkum at koma heim aftur og vita sær, at eingin Finnbogi er okkara millum longur. Ein stór tóm gjógv er í okkara vinarskarða og saknurin verður stórur, men saknurin og sorgin eru størst hjá tær Ásu, og hjá tykkum báðum, Jón og Høgna. Hann, ið valdar ævum øllum, Hann styrkir og troystar tykkum í stóru sorg tykkara.

Friður verið við minninum um okkara trúgva og góða vin, Finnboga Ísakson.

*Kingston upon Tames,*
*7. september 2005*
**Kristiana og Marius**

## Andlát og jarðarferðir

**Finnbogi Ísakson**, Tórshavn, andaðist mikudagin, 62 ára gamal.

Farið verður úr Landssjúkrahúskapellinum leygardagin klokkan 17.

Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni sunnudagin klokkan 14.

Tey, sum vilja minnast Finnboga, kunnu eisini lata Føroya Felag móti Krabbameini eina gávu.

**Maud Heinesen**, Tórshavn andaðist á Landssjúkrahúsinum mikudagin 7. september, 69 ára gomul. Jarðarferðin verður lýst seinni.

Kistan við **Hjalta Næss** fer úr kapellinum á Suðuroyar Sjúkrahúsi hósdagin klokkan 17. Jarðarferðin verður úr Missiónshúsinum í Hvalba fríggjadagin klokkan 13.

Kamilla Benzon:

## Útbúgving á Niels Brock og Føroya Handilsskúla



Kamilla Benzon hevur á Niels Brock Business College og Føroya Handilsskúla, tikið útbúgving innan skrivstovuøkið, við sergrein í ferðavinnu. Læruplássið var P/F Green Gate Incoming í Havn.

Guðrun Gaard mag.art:

## Vardi ritgerð um skaldskapin hjá Regini

**Fríggjadagin 2. september varð almenn Ph.D.-verja á Fróðskaparsetrinum. Tað var Guðrun Gaard, mag.art, sum vardi ritgerð sína "Far fram á torg" um skaldskapin hjá Regini Dahl**

Verjan var í høllini á Føroya Sjómansskúla. Í dómsnevndini hava sitið Idar Stegane, dr. philos, professari á Universitetinum í Bergen, Jógvan Isaksen, lektari á Universitetinum í Keypmannahavn og Malan Marnersdóttir, dr. Phil, professari, á Fróðskaparsetrinum.

Ritgerðin hevur ligið alment frammi á Føroyamálsdeildini á Fróðskaparsetrinum og á Landsbókasavninum.

"Far fram á torg" miðar eftir at skapa eina heildarmynd av yrkingunum hjá Regini Dahl og lýsa lyndiseyðkenni teirra. Eisini leggur ritgerðin dent á at vísa, hvussu yrkingarnar eisini eru royndir at endurskapa tilverumeining í nútíðarruðuleikanum. Málsliga eru yrkingarnar samskifti millum nútíðarrák og



gamlar málkeldur.

Regin Dahl, sum nú er 86 ár, hevur búð í Danmark, síðani hann var blaðungur,

Guðrun Gaard, f. Rasmussen, er 58 ára gomul og úr Havn. Hon varð útbúgvin sjúkrasystir í 1969 og arbeiddi sum sjúkrasystir í 16 ár.

Í 1983 fór hon undir bókmentalestur við Fróðskaparsetur Føroya, har hon tók exam. art. prógv í norðurlendskum máli og bókmentum, tó einamest í føroyskum.

Hon tók magistaraprógv í norðurlendskum máli við lærda haskúlan í Odense í 1991. Síðan 1996 hevur hon arbeitt sum lærari í føroyskum við Føroya Studentaskúla og HF-skeiði í Høydølum.

Árini 2001-2004 skrivaði Guðrun ph.d.ritgerðina um skaldið Regin Dahl.



Týskvøldið 30. august andaðist elskaða kona, mamma, omma og langomma okkara

**Sigrid Petrine Andreasen**

65 ára gomul.

Jarðarferðin verur úr Akranes kirkju fríggjadagin 9. september kl. 16.00.

*Vegna tey avvarðandi*
**Brandur**
**Ingun v/familju, Johannes v/familju og Signar**

*Tey, ið vilja minnast Sigrid, kunnu lata eina peningagávu til konto 9181 4264632 í Føroya Sparikassa*